SAMTÍÐARLÝSARIN
Jens Pauli Heinsen 70

Malan Marnersdóttir

Jens Pauli Heinesen hevur lýst nýtíðar og nútímans Føroyar. Við umfatandi prosaritverki sínum hevur hann skrivað ta stóru føroysku samfelagsskaldsøguna eftir at eitt tíðarskeið í hjálandalíku støðu Føroya endaði við seinna heimsbardaga og varð avloyst av okkara tíðar-skeiði, Heimastýris-Føroyum.

Skaldsøgurnar hjá Jens Paula Heinesen lýsa hugsanir og hugsanarligar skipanir, sum hava gjørt seg galdandi í Evropa. Hann lýsir ikki arbeiðslívið, sjómanslívið ella fiskivinnusamfelagið eins og Martin Joensen og Heðin Brú gjørdu. Heimurin hevur í skaldsøgunum hjá Jens Paula Heinesen fylgt broytingini inn í tað vinnu- og tænastusamfelag, sum vit nú hava, og sum nú sigst vera á veg at gerast eitt vitanarsamfelag. Tað, sum søgupersónarnir hjá Jens Paula Heinesen hugsa og kjakast um, eru idéer, hugsanir og tankar um lívið, um nøkur ætlan er við tí, um náttúruna, djórini og ikki at gloyma politikkin. Arbeiðið er eitt miðal til at sleppa at líva og hugsa - lønararbeiðið er ikki lívið í skaldsøgum hansara. Orðaskiftini hesa seinastu tíðina um sjónleik og samlív benda á tað sama.

Í øllum skaldsøgunum hjá Jens Paula Heinesen snýr tað seg um listamannin og samfelag hansara. Listafólkini gera myndir av heiminum: samfelagnum og politikkinum, lívinum og náttúruni. Tískil kunnu verkini sígjast sum tekin um heimin og kanska tekin upp á heimin.

Leikluturin hjá listafólkinum

Rithøvundurin er í ritverkinum hjá Jens Paula Heinesen altíð til viks ella staddur í útjaðaranum á samfelagnum. Viðhvørt letur hann seg brúka av politiskum áhugamálum, viðhvørt er hann sjálvur flokspolitiskt virkin. Viðhvørt nær rithøvundurin ikki at koma fram sum í *Yrkjaranum í Selvík,* ella hann letur seg við ringum tannabiti brúka av fasistiskum kreftum í bygdini sum í *Tú upphavsins heimi.* Hon kom út í 60'unum og umfatar eisini eina uppgerð við ta støðu, sum grindadráp hevði og hevur sum symbol fyri 'tað føroyska' og 'føroyingin'. Nú aftaná sær uppgerðin við hugburðin um grindadrápið út sum eitt seismografisk tekin um djúp løg í mentanini, sum seinni eru komin upp á yvirflatan. Kanska frá eini aðrari síðu enn væntað, men kortini.

Myndin í *Tú upphavsins heimi* verður útgreinað á annan hátt og víðkað í *Frænir eitur ormurin.* Hon er ein mynd av einum Føroyum, har alt demokrati verður sett úr gildi, har summi verða fyribeind av politiskum ávum, og summi gifta seg strategiskt. Skaldsøgan hevur tveir høvuðspersónar. Ein politikara við eini fortíð at hevna eins og Sjúrður í Sjúrðarkvæðunum. Og ein ríthøvund, sum lýsir alla leiðina hjá honum gjøgnum politisku "skúlingina" og kærleikan fyrst til dóttur politiska mótstøðumannin, síðani til dóttur ideologisku forkonuna í flokkinum, og til hann at enda doyr. *Frænir eitur ormurin* er eisini ein serstøk skaldsøga í føroyskum bókmentum, av tí at hon fer fram á væl kendum plássum, sum eru nevnd við røttum navni. Leikpallur hennara er Havnin, har søgupersónarnir hittast á Tinghúsvegnum, ganga í skúla í Hoydølum, búgva í Munkastovuni, úti í Grønlandi og á Velbastaðvegnum, koyra eftir Marknagilsvegnum og brenna bøkur á Vaglinum.

Somuleiðis ógvuslig, men á heilt annan hátt, er *Tey telgja sær gudar.* Tað er ein skaldsøga um fólk, ið hvør á sín hátt ímynda sær eitt lívsinnihald, sum vísir seg at vera meira ella minni falskt. Pápin at teimum trimum Leonardo, Rubens og Pikasso vildi fegin verið listamálari, men í staðin fyri sjálvur at gerast listamaður, gevur hann synunum glæsilig listamannanøvn. Heldur ikki teir koma undan sum listamenn. Skaldsøgan lýsir hesar miseydnaðu listamenninar gjøgnum eina sálarfrøðiliga teori - hjá Alfred Adler - um, at tað eru minni- og undirlutakenslur hjá fólki, sum fáa tey at útinna vald og harðskap.

Skapandi tilgongdin

Í høvuðsverkinum, teimum 7 bindum *Á ferð inn í eina óendaliga søgu,* er tað sjálv menningarleiðin hjá høvundinum, sum er høvuðsevnið: Barnaár, skúlatíð, ungdómsár og lestrarár, sum er full av upplivingum og hugsanum um lívið, náttúruna og deyðan, menniskjuna, samveruna og einsemið. Í miðdepli er skapandi tilgongdin: Fyrst skal alt upplivast og hugsast, tað skal staðfestast, og síðani kann tað verða skrivað, tá ið búningin er rokkin. Upplivingarnar hjá Hugini eru ikki stórt øðrvísi enn tær, tey flestu onnur hava gjøgnum lívið. Men í *Á ferð inn í eina óendaliga søgu* verða tær gjørdar til tað mest ótrúliga og merkiliga gjøgnum tað frásagnarkynstur, ið eyðkennir skaldsøguna. Hon leggur fyri við, at Hugin verður burturfluttur av eini ungari konu í hvítum turriklæð og gummiskóm, sum eingin í bygdini kennir. Tríggjar dagar seinni verður hann funnin langt burturi í haganum. Tilburðurin eltir hann í ymsum líki gjøgnum barna- og unglingaárini. Tá ið dóttir ta konuna, sum fann hann aftur, mong ár seinni kemur til bygdar og fortelur Hugini, at tilburðurin er til, og hann forelskar seg í henni, er Hugin búgvin at fara at skriva hesa stóru skaldsøgu. Tískil endar skaldsøgan, sum hon byrjaði, við lýsingini av konuni, sum kemur og biður tann 3 ára gamla dreingin koma við.

Tað ljóðar kanska sum *Á ferð inn í eina óendaliga søgu* viðger eitt trongt bygdasamfelag. So er ikki, ikki bara. Eitt nú er tað mesta av gongdini tíðarfest við tilburðum úti í heimi, serliga tilburðir í heimsbardaganum og í kalda krígnum verða brúktir til at festa søguna í tíðini. Hesir tilburðir hava týdning fyri tey mongu orðaskiftini í skaldsøguni um list og bókmentir, samfelagslig sjónarmið og politiskar hugsjónir, sum á henda hátt verða sett í ein alheims samanhang, sum er serstakur í føroyskum bókmentum. Skaldsøgan er eitt dømi um at "hugsa globalt og virka lokalt".

"Føroyska muran"

Ritverkið hjá Jens Paula Heinsen umfatar harafturat eina ørgrynnu av stuttsøgum. Summar koma fyri aftur í *Á ferð inn í eina óendaliga søgu* í "rættari" raðfylgju og "røttum" sambandi, men har eru aðrar, sum eru sannar perlur. Eitt nú tann stutta "Rógv, sonurin, rógv!" um faðir og son á floti, tá eldur kemur í bátin. Jens Pauli Heinesen hevur roynt seg sum erotiskan høvund og sum humorist ella satirikara við søgunum um Sámal Mattias, hann sum eisini er høvuðspersónur í *Rekamanninum.* Við honum setur Jens Pauli Heinesen ljóskastaran á aðrar partar av "føroysku muruni", sum tey flestu ivaleyst ikki so fegin vilja vera við. Og við *Brúsajøkli* hevur hann sett fortíð og nútíð, søgn og hørð facts saman í eina skemtiliga og atfinningarsama mynd av nýtíðar Føroyum, so hvørt mansbarn skilur boðskapin.

Samfelagslýsarin

Tað er eitt fjølbroytt ritverk, Jens Pauli Heinesen hevur skrivað. Hann hevur gjørt skaldsøguna til ein modernaðan føroyskan miðil. Stóra føroyska samfelagslýsandi skaldsøgan um miðjuna av 20. øld er skrivað, og tað er Jens Pauli Heinesen, sum hevur skrivað hana, tí í skaldsøgum hansara umskarast tjóðskaparligur hugsanarháttur og onnur meira nútímans hugarák.

Hjartaliga tillukku við degnum og takk fyri verkið!

Hugleiðingar

á hátíðarløtuni og til framsýningina á Landsbókasavninum í samband við 70-ára dag høvundans 10. november 2002

Kom við!

Jens Paula Heinesen til heiðurs á sjeyti ára degi

Tó eg veit, at dýrgripir
finnast
og fjalast við gráan eim.
(…)

Eisini, eisini tá

veit eg, at lívið er gáva,
eitt dýpi av dýrari tíð,
sum øll skulu valla
ígjøgnum
rekast og villast inní.
Eitt dýpi av dýrari tíð -
Jens Pauli Heinesen.

Kim Simonsen
Kimsimonsen@hotmail.com

Heðin M. Klein flytir fram røðu á Landsbókasavninum, her er rokað av fólki. Hesin tosar fyri Ríthøvundafelag Føroya og heilsar Jens Paula. Skamt eftir hetta var vakra yrkingin: *"Eitt dýpi av dýrari tíð"* borin fram. Unn Patursson syngur ótrúliga vakurt, ein flott rødd. Mikael Blak spælir kontrabass.

Har var upplestur, Eyðun Johannessen læs brot úr: *"Frænir eitur ormurin".* Landsbókasavnið opnaði eina áhugaverda framsýning í hesum høpi. Har vóru røður fluttar fram, men hugur mín og allir tankar fóru á flog og í allar ættir

……
……..

Eg hoyrdi Hugin og Duritu fyri mær. Tey hjá inni Pól Martini í grannahúsinum skeldast. Og so hetta Kom við! Kom við! Hetta er huldugentan, ið tekur Hugin við sær.

Við hesi hending er lívsleið Hugins løgd, hann sær alt uttaní frá, hetta er gandurin, ið fær hann at gerast eðrvísi enn onnur, vanlukkan, ið kanska gerst hansara størsta eydna. Hetta er ikki sum við Kay í Snjódrotningini hjá H.C.Andersen, ið fær trøllasplintur í eyga, so at alt gerst kalt, ljótt og ræðuligt. Hugin fær eitt slíkt hulduspplintur í eyga og sál, ið fær bygdina, sandin og brimið at gerast ein opinbering av vakurleika og skaldskapi.

Fyri meg var hetta ein vøkur løta, at sita her, tí hetta skald opnaði míni eygu fyri bókmentum, tá eg sjálvur var eitt barn, sum Hugin. Jens Pauli og so Heðin Brú, men her var eingin rómastampur, drýleting, og hasin gamli heimurin var hjá Jens Paula broyttur til ein nýggjan og modernaðan. Frá øllum trongum bygdagøtum fullum av slatri, jantelóg og teim smáu og trongu Føroyum, ið eg kendi alt ov væl, trein ein miðeuropeiskur intellektuellur høvundur fram, og eins og William Heinesen kláraði hann at siga frá, og endurskapa stór temu, ið æviga liva innan alla list. Allastaðni í skaldskapinum hjá Jens Paula er bardagin hjá tí intellektuella lýstur, sum bardagin móti bøðilinum, ella móti tølandi lívsumstøðum. Jens Pauli hevur altíð verið eitt modernað menniskja, ið skrivar um tað nívandi, tað vandamikla, lítlu bygdina sum bøðil, um trá, um agg, kynsdráttin og um gandin í lívinum. Hjá honum fann eg onkran at "tosa við" um Gud og um Illamann, um list og vakurleika. Sum Jógvan Isaksen tekur til, so var bæði hjá Williami og Jens Paula menniskjað kjarnin, meðan himmalin ikki er ein viðkomandi veruleiki. Hetta er heilt ótrúligt hjá teim flestu enn í dag, men veruleikin hjá intellektuellum og listafólkum í 20. øld. Her er eisini møguligani svarið, hví Jens Pauli ikki (undantikið er søgan um Rekamannin) er ein meiri fólksligur føroyskur høvundur.

Eg vaks til í eini tíð, har vandin fyri atomkríggi var alnærverandi, eg kendi geislavirkið í hvørjari kyknu sum barn, har eg mangan sat og sá út í regnfullar dagar, gjógnum vindeyga og hugsaði, um bakkarnir, fjørðurin og um øll húsini nú fara at standa tóm? Um ikki so frægt sum eitt heimalamb fór at liva eftir, tá nú atombumban fór at bresta? Eg vónaði at doyggja av bjarta ljósinum, so eg ikki skuldi finna øll hini deyð. Men fór endatíðin at koma fyrst. Johannesa opinbering ræddi meg, eins og henda ræðuliga bók ræddi Hugin. Eg fann tó ugga í listini.

Hjá Jens Paula var eingin hálovan av bygdini, heimlandinum men ein djúp samkensla við ofrum sum við bøðili. Ikki nakað agg mótvegis bygdini ella lívinum. Hjá honum møta vit eini endurvinning av einum mistum heimstað, æviga eiga vit kanska bert tað farna.

Í skaldaheimi

Minnir duttu á meg tá eg fann bókina: "Yrkjarin í Selvík" á framsýningini hjá Landsbókasavninum, ið minti meg um tíðina, tá eg fann røðina av bókum kallað: *"Á ferð inn í eina óendaliga søgu".* Ongantíð gloymdi eg hasa bókina um: "Yrkjarin í Selvík", hann tekur t.d. til um listina, at: *"Sanni veruleikin liggur oman fyri alt, liggur her uppi og varir um aldur og alla ævi".* Hann sær onnur viðri enn hini, hevur ein sjónarring, ið skoðar tað æviga og vakra, meðan tey í bygdini spotta hann. Her er stóra temaði; listin mótvegis tí timiliga samfelagnum; listamaðurin mótvegis borgarliga lívinum. Hetta er eisini stóra temaði í skaldskapinum hjá Jens Paula.

Í skúlaárunum á Strondum royndi okkara høgtmetti lærari í føroyskum at leggja nakað av mentan í beinini á okkum óargadýrum við bókini: *"Nú ert tú mansbarn á foldum".* Hetta var í sjeynda flokki haldi eg, so bókin hevði bert nøkur fá ár á baki tá. Eingi lurtaði eftir hesum manni, ið til fánýtis kastaði perlur eftir eini andligari deyðari fjøld. Men eg var langt frá deyður, kanska eg tá læt sum um eg ikki fylgdi við, kanska fylgdi eg ikki við, men eg hevði fyri langari tíð síðani lisið bókina í loyndum og nógvar av hinum eisini. Eg føldi, at eg var Hugin sjálvur, og at Jens Pauli skrivaði um mitt lív. Sitandi á Landsbókasavninum kom eg at minnast, hvussu eg byrjaði at síggja alt við eygunum hjá høvuðspersóninum í bókini: "Yrkjarin í Selvík", hvussu skúlin, bygdin og alt hvarv so líðandi, sum eg sjálvur byrjaði at hvørva inn í ein heim av list, søgu og skaldskapi. Ein bleikur, følin og kanska merkeligur drongur, sum tó helt seg eiga nakað meiri enn tey, sum ráddu, kúgaðu og ræddu ein, eitt atgongumerki til eina skaldaverð.

Hátíðarhaldið var væleydnað, sjálvt um eg hevði torført við at lurta eftir, men eg haldi longu eg skilti hatta varliga og lokkandi: Kom við!

Kom við!

Jens Pauli bjóðar tær atgongumerkið til stað har:

…dýrgripir finnast
og fjalast við gráan eim. (…)

Eisini, eisini tá

veit eg, at lívið er gáva,
eitt dýpi av dørari tíð,
sum øll skulu valla ígjøgnum
rekast og villast inní.